# Jólakalendarin 2005

# Jólini í Hvannadali



**Partur 6**

Inn hjá Leikamafiuni er gott lag. Teir eru so glaðir fyri gávurnar, at teir bæði hava gloymt kuldan og svongdina. Men hvat skulu teir gera við jólamannin, og hvussu skulu teir bera seg at fyri ikki at verða fangaðir av politistinum? Teir vita, at øll bygdin bíðar eftir jólamanninum og um jólamaðurin ikki kemur at tendra jólatræið til tíðina, so fara bygdarfólkini við vissu at leita eftir honum.

Stampi og Anthonio hugsa, so tað brakar. Brádliga loypir Stampi upp.

- Eg veit, hvat vit skulu gera. Vit lata okkum í reyð klæðir, so vit líkjast nøkrum jólamonnum. So fara vit oman í bygdina at tendra jólatræið. Eingin leggur til merkis, at tað eru vit.

- Jú, men jú men..., stamar Anthonio.

- Eg eri ikki liðugur at tosa enn, sigur Stampi - tí veitst tú, hvat tað besta er?

- Nei, hvat er tað Stampi? Í nátt fara vit inn í øll húsini í Hvannadali og í staðin fyri at leggja pakkar undir trøini, so stjala vit pakkarnir sum liggja har.

- Tú ert fantastiskur – men hvar fáa vit reyð klæðir frá, og hvussu skulu vit bera okkum at við at fáa skegg? kemur tað spyrjandi frá Anthonio.

- Uppi á loftinum liggja nøkur reyð løk, og seyðaull kann brúkast sum skegg, er Stampi skjótur at svara.

- Tú ert genialur Stampi!!!

Tíðin er knøpp, og tí mugu teir skunda sær. Teir taka tey reyðu løkini undan loftinum og klippa hol í tey. Síðani smoyggja teir løkini yvir seg, so at høvdini stinga burtur úr. Til síðst binda teir seyðaullina um høvdið.

- Nú eru vit rættir jólamenn - vit líkjast so nógv ordiligum jólamonnum, at eingin fer at leggja til merkis til tað, sigur ein glaður Stampi.

Teir hyggja enn einaferð eftir jólamanninum – jú hann er enn svímaður. Teir fara út, koyra hurðina aftur og so halda teir oman bygdina.

Í bygdini er borgarstjórin komin upp á pallin. Borgarstjórin, sum er ein lítil tjúkkur maður, bjóðar øllum borgararanum at vera hjartaliga vælkomnir til hesa løtu.

- Góðu borgarar, eg vil her við bjóða tykkum at verða vælkomin til hesa hugnaløtu. Um eina lítla løtu fer okkara barnakór at syngja tveir jólasangir, og tá tey eru liðug at syngja, kemur jólamaðurin at tendra jólatræið. Eg vil enn einaferð bjóða tykkum at verða vælkomin, og gevi eg orðið víðari til barnakórið.

Og meðan børnini syngja tveir vakrar jólasangir, líður mannfjøldin á – nøkur syngja spakuliga við, meðan onnur bara njóta at hoyra hesar sangirnar. Trølla Pætur og Trølla Omman standa millum øll fólkini. Trølla Omman hevur ikki so gott tol – hon vil síggja jólamannin beinanvegin. Men Trølla Pætur biður hana taka tað róligt, tí nú verður tað ikki leingi, til jólamaðurin fer at koma.

Jógvan og Erling ganga millum fólkini og fylgja væl við um nakar ger ónáðir. Jógvan hevur enn ilt í høvdinum av stoytinum, sum hann fekk, tá Erling misti hamaran á høvdið á honum, so Erling torir ikki at siga nakað við hann

Stampi og Anthonio eru nú komnir heilt oman í bygdina. Teir snúgva seg millum húsini, og áðrenn nakar varnar, so standa teir aftan fyri pallin. Borgarstjórin er glaður fyri at síggja jólamennirnar og heilsar pent upp á teir.

- Hvussu ber tað til, at tit eru TVEIR jólamenn, tað plagar bara at verða ein?

Stampi er skjótur at svara aftur, at í ár hava børnini í Hvannadali skikkað sær serliga væl, og tí mugu tveir jólamenn til at bera allar pakkarnar.

Tað eru góð boð hjá borgarstjóranum at hoyra. Nú er barnakórið liðugt at syngja. Verið tit klárir og komið upp á á pallin, tá eg biði tykkum koma, sigur ein yvirfegin og stoltur borgarstjóri.

Hann fer upp á pallin og yvir til mikrofonina.

- Góðu borgarar í Hvannadali og ikki minst góðu børn. Nú hava tit bíðað nóg leingi, og skal eg ikki gera hesa løtu longri enn neyðugt. Tað er mær ein stór æra at bjóða... ikki bara einum, men tveimum jólamonnum, at verða hjartaliga vælkomnar til Hvannadal. Takið væl í móti jólamonnunum.

*Puntur 8 til jólakalendaran*




